# Jákup í brennideplinum

**Hóast hann hevði nógvar góðar bjargingar, so verður mest fokuserað upp á, at hann ikki átti at havt ivast, tá ið fríspark kom innfyri og Aberdenn legði seg framum**

SKOTLAND
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er ikki serliga takksamt at vera málverji. Um maðurin á málstrikuni ger eitt mistak, so verður tað fokuserað upp á tað, og so tykist oftast tað at vera gloymt, sjálvt um málverjin hevur havt eina røð av góðum bjargingum.

Nakað soleiðis var tað hjá Jákupi Mikkelsen í Aberdeen leygardagin. Fyri fyrstu ferð síðani í oktober 1998, tá ið hann vardi føroyska málið í 2–1 tapinum á Pittodrie leikvøllinum, var hann aftur á sama vølli. Úrslitið var tað sama, sum tað var ta ferðina. Aberdeen vann 2–1. Hetta var fyrsti sigurin hjá teimum í hesum kappingarárinum. Tað hevði esini við sær, at Partick Thistle framvegis eigur fyrsta sigurin til góða.

10.597 áskoðarar vóru vitni til eina uppgerð, har viljin og ferðin vóru sjónligari enn gott fótbóltsspæl.

Heimaliðið legði seg á odda í 5. minutti, og tað var í hesum førinum, at skotsku fjølmiðlarnir settu kikaran á Jákup Mikkelsen. Miðlarnir vilja vera við, at Thistle málverjin ivaðist ov nógv inni á strikuni, og at hann átti at havt lopið úr málinum, tá ið fríspark uttanvert brotsteigin kom innfyri. Tí var tað lætt hjá Scott Booth at stúta bóltin í málið verður sagt.

Í onkrum av bløðunum verður Jákup so nógv niðurgjørdur, at teir siga seg ikki ivast í, at fyrrverandi málverjin, Kenny Arthur, sum var skaddur, tá ið Jákup kom til felagið, nú fer at fáa møguleikan aftur, tí Jákup skal hava verið so ótryggur.

Í øðrum bløðum verður Jákup róstur fyri nógv góð avrik. Eitt nú verður víst á, at hann dygst undan steðginum og eisini dygst eftir steðgin og fram ímóti dystarenda ferð eftir ferð vann tvídystir, tá ið mótstøðumenn vóru einsamallir.

Partick Thistle javnaði í 52. minutti. Jarnie Mitchell var málskjútti, men eitt korter undan leikloki fekk Aberdeen sigursmálið. Liðformaðurin Russel Andersson stútaði bóltin í málið eftir hornasparksinnlegg. Hann var høvdið omanfyri allar verjuspælararnar, tá ið hann setti bóltin í málið aftanfyri Jákup Mikkelsen.

Partick Thistle venjarin, Gerry Collins, helt eftir dystarenda, at tað kom sera illa við hjá hansara monnum, at liðformaðurin, Derek Whyte, longu í 13. minutti noyddist at taka seg burturúr stríðnum, tí hann hevði fingið ein vøddaskaða. Tað órógvaði miðverjuna rættuliga nógv, og liðið restaði leiðslu inni á vøllinum, helt venjarin. Í staðin fyri skadda mannin kom franski Jean Yves Anis á vøllin. Hann varð keyptur til felagið um somu tíð, sum Jákup kom til Partick Thistle.




*Tað var misjavnt, hvussu metingin um avrikið hjá Jákupi Mikkelsen var leygardagin. Serliga varð fokus sett á hansara leiklut við fyrra málið hjá Aberdeen*

**Danska superligan**

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 12 | 3 | 9 | 16 |
| 2 Esbjerg | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 13 | 8 | 5 | 14 |
| 3 OB | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 13 | 8 | 5 | 13 |
| 4 FCK (M) | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 12 | 7 | 5 | 13 |
| 5 FCM | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 11 | 9 | 2 | 13 |
| 6 Viborg | 7 | 2 | - | 3 | - | 2 | 11 | 12 | -1 | 9 |
| 7 Frem | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 8 | 10 | -2 | 9 |
| 8 AaB | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 5 | 8 | -3 | 7 |
| 9 AGF | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 9 | 15 | -6 | 7 |
| 10 AB | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 7 | 14 | -7 | 7 |
| 11 Herfølge | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 5 | 9 | -4 | 6 |
| 12 FC Nordsj. | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 7 | 10 | -3 | 5 |

Føroyskir Leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

**Skotska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Rangers | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 19 | 5 | 14 | 15 |
| 2 Celtic | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 13 | 2 | 11 | 13 |
| 3 Hearts | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 8 | 1 | 7 | 12 |
| 4 Dundee | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 6 | 5 | 1 | 7 |
| 5 Motherwell | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 7 |
| 6 Dunfermline | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 4 | 6 | -2 | 7 |
| 7 Hibernian | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 6 | 9 | -3 | 7 |
| 8 Livingston | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 4 | 8 | -4 | 5 |
| 9 Aberdeen | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 6 | 9 | -3 | 4 |
| 10 Kilmarnock | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 4 | 10 | -6 | 4 |
| 11 Partick | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 6 | 9 | -3 | 2 |
| 12 Dundee Utd. | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 2 | 13 | -11 | 1 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)

**Danska 1. deild**

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 7 | 7 | - | 0 | - | 0 | 17 | 3 | 14 | 21 |
| 2 Silkeborg | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 20 | 6 | 14 | 18 |
| 3 Ølstykke | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 19 | 12 | 7 | 18 |
| 4 Randers FC | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 16 | 11 | 5 | 16 |
| 5 Køge | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 15 | 9 | 6 | 13 |
| 6 Fredericia | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 13 | 9 | 4 | 13 |
| 7 HFK Sønderj. | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 22 | 14 | 8 | 12 |
| 8 Fremad Amager | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 13 | 11 | 2 | 11 |
| 9 Skjold | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 15 | 12 | 3 | 10 |
| 10 FC Nordjylland | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 8 | 12 | -4 | 9 |
| 11 Vejle | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 9 | 13 | -4 | 8 |
| 12 B 93 | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 11 | 15 | -4 | 6 |
| 13 B 1913 | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 8 | 18 | -10 | 5 |
| 14 Nykøbing | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 11 | 16 | -5 | 4 |
| 15 FC Aarhus | 8 | 0 | - | 1 | - | 7 | 6 | 25 | -19 | 1 |
| 16 Brønshøj | 7 | 0 | - | 0 | - | 7 | 5 | 22 | -17 | 0 |

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers Freja), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Íslendska Landsbankadeildin**

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 KR | 17 | 10 | - | 3 | - | 4 | 28 | 20 | 8 | 33 |
| 2 ÍA | 17 | 8 | - | 5 | - | 4 | 26 | 20 | 6 | 29 |
| 3 FH | 17 | 8 | - | 3 | - | 6 | 29 | 24 | 5 | 27 |
| 4 Fylkir | 17 | 8 | - | 2 | - | 7 | 23 | 22 | 1 | 26 |
| 5 ÍBV | 17 | 7 | - | 2 | - | 8 | 24 | 24 | 0 | 23 |
| 6 Þróttur | 17 | 7 | - | 1 | - | 9 | 27 | 28 | -1 | 22 |
| 7 Grindavík | 17 | 7 | - | 1 | - | 9 | 23 | 30 | -7 | 22 |
| 8 KA | 17 | 6 | - | 3 | - | 8 | 28 | 26 | 2 | 21 |
| 9 Valur | 17 | 6 | - | 2 | - | 9 | 22 | 27 | -5 | 20 |
| 10 Fram | 17 | 6 | - | 2 | - | 9 | 21 | 30 | -9 | 20 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA)

**JPS maskinverkstaður**

**Vit átaka okkum –**
- Alt smiðjuvirksemi
- Motorumvælingar
- Stálarbeiði / sveising
- Bilumvælingar
- Hita & sanitet

**Sp/f JPS maskinverkstaður**
**FO-627 Lamba**
**Sjúrður: tel 217513 / 447513**
**Jákup Petur: tel 221755**

Sosialurin 341800



**Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð**
**Nú eisini úr Føroyskum gróti**
Skjót levering
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið
Danstein Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
Sosialurin - 311820



**Volvo-lastbilur til sølu**

Ein fl6-14 Volvo lastbilur til sølu um nóg høgt boð fæst.

Hevur júst verið til sýn og øll dekkini eru nýggj.

**Ring á tlf. 22 80 63**

*Gravarhjálp*

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

*Tel 311723 - 211723 · Fax 321722*

Sosialurin 341800

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1738, Sp/f Klivin, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar**:
05.05.2003 og 29.08.03.
**Kapitalur:**
Lækking við kr. 220.000,00 til kr. 80.000,00 til rindan av halli.

*Skráseting Føroya tann 12. september 2003*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 19, P/F Karl Fr. Johansen A/S, 100 Tórshavn.

**Navn:** P/F Karl Fr. Johansen A/S
**Adressa:** 100 Tórshavn
Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingar-nr. P/F 277, P/F Føniks.

*Skráseting Føroya tann 12. September 2003*
*Kristin Balle*

LANDSVERKFRØÐINGURIN

**ÚTBJÓÐING**

Við hesum verður arbeiðið at gera brúgv um Gjógvará á Skála boðið út í almenna lisitatión. Arbeiðið fevnir um gerð av 14 m langari og 11 m breiðari betongbrúgv.

**Høvuðsnøgdirnar eru:**
Betong til landfesti 70 $m^3$
Betong til brúgvadekk/bjálkar 75 $m^3$
Spreinging fyri landfesti 100 $m^3$

Harafturat skal rekkverk/bilverja, fuktverja á brúgvadekk, kantsteinar og asfaltering av brúgv gerast.

Lisitatiónin verður hjá Landsverkfrøðinginum, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, týsdagin 30. september 2003, kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 18. september 2003 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 2.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 128.229.6 í Føroya Sparikassa ella á konto nr. 431.468.0 í Føroya Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

**Landsverkfrøðingurin**
Tinghúsvegur 5 · Postbox 78 · 110 Tórshavn
Telefon 311333 · Telefax 314986
Teldupostur: lv@lv.fo

LB SERVICE

**Sveisiarbeiði**

Alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og aluminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði

**LB-Service**
**v/Lars Bisgaard**
**tel 422127 / 220957**

Sosialurin 341800

**Koppingarevni fyri garnasótt!**

**Til allar seyðamenn**

Teir, sum ynskja broytingar í skamtatali ella hava aðrar rættingar, sum t.d. broytan av ánara, verða bidnir at boða Tjaldurs apoteki frá innan mánadagin 22. september á tel 341100

**Tjaldurs apotek**

Tjaldurs Apotek • Postboks 3010 • 110 Tórshavn
Tel. 34 11 00 • Fax. 34 11 95
e-mail: tjaldur@apotek.fo • www.apotek.fo

Sosialurin 341800



**Blákrossheimið søkir eftir**

**Sjúkrarøktar-frøðingi**

Talan er um eitt avloysarastarv, 0,8 tíð, í skiftandi vaktum at byrja 01.10.2003 og fram til 30.09.2004

**Starvið umfatar**
Sjúkrarrøktarligu uppgávurnar í sambandi við avrúsan og viðgerð á heiminum. Harumframt eru nøkur praktisk ábyrgdarøki knýtt at starvinum.

**Setanarviðurskifti**
Løn- og setanatreytir annars verða sambært sáttmála millum Almanna- og Heilsumálaráðið og Sjúkrarøktarfrøðingafelag Føroya

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá Olgu Magnussen, leiðara, á tlf. 315575.

**Blákrossheimið**
Lynggøta 12
100 Tórshavn
Tlf. 315575 · fax. 315567

Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri.

Pláss eru fyri 15 búfólkum. Eisini er búfelagsskapur og eftirviðgerð knýtt at heiminum.

Blái Krossur Føroya er ein kristiligur hjálparfelagsskapur, sum hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsevnismissnýtslu, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi, og at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.



**Ársaðalfundur**

Útsetti ársaðalfundurin hjá Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag verður **sunnudagin 28. september 2003 kl. 14. 30** í KFUM og K í Klaksvík.

Fundarskrá: 1. Ársfrágreiðing
2. Ársroknskapur
3. Val av nevndarlimum
4. Val av tiltakslimi
5. Val av grannskoðara
6. Ymiskt

Uppskot, sum limir ynskja at koma til viðgerðar á aðalfundi, og uppskot til nevndarlimir, mega vera formanninum, Una Næs, 530 Fuglafjørður, í hendi **8 dagar framman undan** aðalfundinum.

Í sambandi við aðalfundin verður eisini alment møti í KFUM og K kl.18.00.

**Nevndin**

Sosialurin 341800

**Lær at skriva føroyskt á alnetinum !**

– www.portal.fo
<http://www.portal.fo>
– privatar heimasíður

Sosialurin 341800